**Aud í Soylu**

(3)

| | |
|---|---|
| **Fra:** | Súnfríð Lambaa <sl@hafnia.fo> |
| **Sendt:** | hósdagur 24 januar 2019 17:59 |
| **Til:** | Heilsu- og innlendismálaráðið |
| **Cc:** | minpoulsen@gmail.com |
| **Emne:** | Viðmerkingar til Uppskot til løgtingslóg um virksemi á rúsdrekka- og rúsevnaviðgerðarstovnum |

Til Heilsu- og Innlendismálaráðið
Sirið Stenberg, landsstýriskvinna

Tað er ein sonn gleði at síggja, at landsstýriskvinnan hevur tikið stig til lóggávu á viðgerðarøkinum. Hettar uppskot er eitt megnaravrik, og eitt risafet rætta vegin!

Undirritaðu hava nakrar viðmerkingar til uppskotið:

- Gransking vísir, at kvinnur hava heilt serligan tørv, tá tað kemur til rúsdrekka- og rúsevnisviðgerð. Tí mæla vit til, at serlig viðgerð fyri kvinnur verður nevnd sum ein viðgerð fyri seg.
- Gransking vísir, at familjur raktar av misbrúki verða sera hart raktar. Tí mæla vit til, at serlig familjuviðgerð verður nevnd sum ein viðgerð fyri seg.
- Øll starvsfólk á viðgerðastovnum skulu setast eftir fyrisitingarlógini. Øll størv skulu lýsast leys, eisini avloysarastørv og størv niðursetta tíð.
- Fólk ið sjálvi hava verið í viðgerð hava fyrimun í sambandi við starvssetan, um tey eisini hava viðkomandi útbúgving.
- Tagnarskylda sambært fyrisitingarlógini má nevnast sum eitt evni fyri seg.
- Í sambandi við útbúgving hjá starvsfólki má útgangsstøðið verða, at øll starvsfólk hava góðkenda miðallanga útbúgving og eftirútbúgving samsvarandi teirra starvslýsing.
- Løggildur sálarfrøðingur skal vera í starvi.
- Nevndin fyri viðgerðarstovnar skal setast av landslæknanum. Nevndin kann ikki velja seg sjálva. Ynskiligt er, at umboð eru frá Heilsumálaráðnum og Fyribyrgingarráðnum. Og fyri viðgerðarstovnin Heilbrigdi umboð frá Tænasturáðnum hjá AA.
- Nevndin skal seta leiðara sambært fyrisitingarlógini.

Virðingarmest
Súnfríð Lambaa og Minna Poulsen